gult10 cyan10 magenta10 svart10



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Línukvotan einki við nótabátar at gera

**Íslendskir línubátareiðarar skjóta heilt skeivt, tá teir siga, at íslendskir nótabátar fáa fiskirættindi í føroyskum sjógvi í býti við at føroyskir línubátar sleppa at royna á íslandsmiðjum. Føroyska botnfiskakvotan undir Íslandi hevur einki at gera við sínámillum avtalurnar, sum føroyingar og íslendingar hava um uppisjógvafisk, svartkjaft, lodnu og sild, sigur Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri**

*Justinus Leivsson Eidesgaard*



Vit skrivaðu í Sosialinum fríggjadagin, at íslendskir línumenn eru illir inn á íslendsku myndugleikarnar, tí teir hava givið føroyingum og norðmonnum fiskirættindi eftir brosmu, longu og blálongu í býti við kvotur til íslendskar trolarar og nótabátar í Barentshavinum og við Føroyar.

– Hvat íslendingar og norðmenn hava avtala skal eg ikki leggja meg út í, men tað er heilt skeivt at fara at blanda føroysku botnfiskakvotuna í íslendskum sjógvi saman við fiskirættindini hjá íslendskum uppisjógvaskipum í føroyskum sjógvi, sigur Jørgen Niclasen.

– Botnfiskaavtalan við Ísland stavar heilt aftur frá 20. mars 1976, tá íslendingar fluttu fiskimarkið út. Tá hetta hendi mistu føroyingar fiskirættindi, sum teir høvdu havt í næstan 100 ár. Danir lótu føroyingar sjálvar tingast við íslendingar og ein fiskiveiðuaftala, tann fyrsta yvirhøvur, varð undirskrivað millum føroyingar og íslendingar. Tann fyrsta var upp á 17.000 tons. Síðan er hon minkað og er nú niðri á 5.600 tonsum. Harav eru 1200 tons toskur og 80 tons kalvi. Restin eru onnur botnfiskasløg.

– At íslendingar hava fingið fiskirættindi frá norðmonnum og russum, tí teir hildu fast um síni rættindi at fiska í altjóða sjógvi í Loynikrókinum hevur givið teimum nógv størri fiskirættindi enn føroyingar, sum valdu at vera skikkiligir og lurta eftir norðmonnum og russum, men tað er ein onnur søga, sigur Jørgen Niclasen.

– Avtalurnar millum føroyingar og íslendingar byggja á fyrimyndarliga gott grannalag. Og megintónin í hesum samstarvi er, at eiga vit nógv av einum fiskaslagi, so lata vit íslendingum og umvent. Dømi er Norðhavssildin. Íslendingar sleppa at fiska teirra part av norðhavssildini hjá okkum, kemur hon ikki í íslendskan sjógv, sigur Jørgen Niclasen.

– Í samráðingunum við íslendingar er munandi betri pláss enn tá vit samráðast við onnur lond, har rokna verður krónu fyri krónu, sigur hann.

## Olja etir svartkjaftavinningin

Norska svartkjaftatíðin er komin at enda í ár og teir hava 43 skipum veitt 370.000 tons av svartkjafti til eitt virði av 269 norskum krónum. Prísurin er eini 10 oyru hægri enn í fjør, men hesin er upp etin av høgum oljuprísum, so endaliga úrslitið av svartkjaftaveiðuni er ikki gott fyri norsku trolararnar. Norðmenn kláraðu ikki at fiska kvotuna upp í ár. Eini 50.000 tons eru eftir og hesi gangan í altjóða sjógvi, føroyskum og ES sjógvi. Ein orsøk til at norðmenn ikki hava uppfiskað svartkjaftakvotuna er at góður prísur var á lodnu í Barentshavinum og tí komu teir seint í gongd við svartkjaftaveiðuni.

Nú meðan svartkjaftaveiðan er um at vera av fyri norðmenn, so gera teir klárt til sildaveiðuna í Norðsjónum. Her gongur sildin og etir seg feitan, soleiðis at tann feitasta kann seljast á hálendska marknaðinum sum matjesild og hendan kann geva upp til 10 krónur fyri kiloið.

## Christian í Grótinum fingið 32.000 tons av svartkjafti

Christian í Grótinum, sum hevur verið á svartkjaftaveiðu síðan 15 januar hevur higartil landað 32.000 tons. Hetta sigur Palli Ziskason, sum er reiðari hjá skipinum. Christian í Grótinum hevur landað 16 ferðir í hesum tíðarskeiði, í samrøðu við InterSeafood.com.

Christian í Grótinum hevur landað í Føroyum og á Eysturlandinum í Íslandi á Norðfjørðinum og á Eskifirði.

Palli Ziskasson sigur, at oljuprísirnir eru høgir og hækking merkist væl hjá einum skipið, sum brúkar millum 18-20.000 litrar um samdøgnið, men at prísurin hevur hildið sær lægri enn hann roknaði við.

## 17 fyritøkur úr Caithness vitjaðu

Fólk gjørdust bilsin tá ein skoti knappliga trein fram á Tinghúsvøllinum flaggdagin og bar fram kvøðu til alt Føroya land undir Flaggdagshaldinum. Talan var um ein lim í einari skotskari sendinevnd, sum hevur vitjað í Føroyum, við tí fyri eyga at fáa tættari samband við føroyska vinnulívið.

Í løtuni og eisini seinastu árini hevur fitt av samstarvið verið millum føroysku og skotsku fiskivinnuna, serliga við tað at føroysk skip hava selt í Skotlandi og at tey eru umvæld har. Men sendinevndin hesuferð hugdi meira eftir samstarvi í eini komandi oljuvinnu, nú leitingin eftir olju undir Føroyum í summar.

Áðrenn tey komu til Føroyar, vistu tey lítið og einki um Føroyar og føroyska vinnulívið. Nú hava tey eina vitan, sum tey kunnu byggja víðari uppá. Kontaktir eru skaptar og ætlanin hjá Caithness Partnership er at koma aftur til Føroyar einaferð í oktober við eini framsýning. Fyritøkur úr Caithness ætla tá at vísa seg fram og bjóða føroyskum fyritøkum at koma. Fyritøkurnar vóna at skapa samband, sum kann enda í einum vinnuligum samstarvið.

## Gólvuppboðssølan

Gólvsølan

39 bátar seldu sløk 16 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarkinaðinum hósdagin. Sølan hjá einstøku bátunum eins og býti av samlaðu veiðuni framgongur av yvirlitinum niðanfyri

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | SIRIÐ | LÍNA | 107 |
| FD 123 | RIDDARIN | SNELLA | 148 |
| FD 237 | EYÐ | SNELLA | 100 |
| FD 256 | AÐNASKER | SNELLA | 172 |
| FD 316 | ANNFRÍÐ | SNELLA | 440 |
| FD 33 | KRABBIN | SNELLA | 141 |
| FD 363 | LÍÐARBRÚGV | SNELLA | 219 |
| FD 390 | ELISABETH | SNELLA | 197 |
| FD 421 | HJALLUR | SNELLA | 540 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 416 |
| FD 48 | HANS PETUR Í BREKKUM | SNELLA | 111 |
| FD 492 | KLETTUR | LÍNA | 435 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 2.053 |
| FD 553 | BRANDUR | LÍNA | 1.667 |
| FD 587 | KATRIN | SNELLA | 141 |
| FD 660 | FALKURIN | LÍNA | 113 |
| FD 733 | RIVTANGI | SNELLA | 425 |
| FD 784 | VÓNIN | SNELLA | 203 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 421 |
| FD 983 | JOAN M/B | SNELLA | 138 |
| FD1092 | SJÓSTJØRNAN | SNELLA | 210 |
| FD1098 | BYLGJAN | SNELLA | 257 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 59 |
| TG 185 | EGIL | SNELLA | 266 |
| TG 262 | LEIF M. | SNELLA | 109 |
| TG 376 | DÚGVAN | SNELLA | 101 |
| TG 405 | NIELS PAULI | BOTNTROL | 60 |
| TG 60 | SJÓFARIÐ | SNELLA | 455 |
| TG 620 | BERGUR II | SNELLA | 114 |
| TG 631 | SKARSTEIN | SNELLA | 186 |
| TG 802 | BRATTANES | SNELLA | 591 |
| TN 204 | MÝLINGUR | BOTNTROL | 619 |
| TN 381 | SANCY | SNELLA | 263 |
| TN 712 | TEISTAKLETTUR | LÍNA | 313 |
| TN 805 | ANNA | SNELLA | 175 |
| TN 892 | NØVAN | SNELLA | 118 |
| TN 919 | MORGUNROÐIN | SNELLA | 2.381 |
| VN 309 | ATLANTA | SNELLA | 163 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 964 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| BROSMA 0 | 223 |
| HÝSA 0 | 7 |
| HÝSA 1 | 142 |
| HÝSA 2 | 451 |
| HÝSA 3 | 437 |
| HÝSA 4 | 321 |
| HAVTASKA 0 | 12 |
| HVÍTINGUR 0 | 48 |
| KALVI 2 | 53 |
| KALVI 3 | 4 |
| KALVI 4 | 10 |
| LANGASPORL 1 | 2 |
| LIRI | 402 |
| LONGA 0 | 8 |
| LONGA 1 | 14 |
| REYÐSPRØKA 0 | 11 |
| SKØTA | 1 |
| SKØTURAVAR | 17 |
| SKRUBBA | 37 |
| STEINBÍTUR | 63 |
| SVARTKALVI 0 | 21 |
| TOSKUR 1 | 116 |
| TOSKUR 2 | 465 |
| TOSKUR 3 | 5.129 |
| TOSKUR 4 | 5.230 |
| TOSKUR 5 | 1.871 |
| TUNGA 0 | 8 |
| UPSI 0 | 349 |
| UPSI 1 | 139 |

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Føroyingar skulu órógvast minst møguligt av russarum

**Jørgen Niclasen tekur atfinngingarnar frá føroysku lemmatrolarunum at sær og hann fer nú at gera nakað við málið**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

– Føroyskir lemmatrolarar skulu í mest møguligan mun hava frið fyri russsisku svartkjaftatrolarunum undir Føroyum. Tí fara vit at gera nakað við málið.

Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, hevur tikið atfinningar frá lemmatrolarunum at sær.

– Tað slepst ongantíð heilt undan, at bátarnir, sum fiska undir Føroyum, órógva høvnn annan eitt sindur. Men tað er okkara uppgáva at bera so í bandi, at teir órógva hvønn annan minst møguligt.

Hann sigur, at meiningin við russiska svartkjaftafiskiskapinum undir Føroyum er als ikki, at teir skulu kongafisk, ella annan fisk.

Fiskimálaráðharrin sigur, at eftir hagtølunum, sum eru til taks, hava russararnir at kalla als ikki fiskað nakran kongafisk undir Føroyum.

– Men tað vísir seg, at hetta seinasta árið er ein stór broyting hend í russiska fiskskapinum eftir svartkjafti undir Føroyum, tí í 2000 hava russisku skipini givið upp, at tey eisini hava fiskað gott 2.500 tons av kongafiski undir Føroyum. Samstundis eru teir farnir longur vestur at fiska.

Samstundis hava føroysku lemmatrolararnir ikki fiskað meiri enn eini 5-6.000 tons av kongafiski undir Føroyum í 2000. Sostatt hava russararnir fiskað eina rættiliga stóra nøgd av kongafiski.

– Tí kann staðfestast, at fiskiskapurin hjá russarunum eftir svartkjafti undir Føroyum er nógv broyttur seinasta árið, tí kongafiskur skal ikki takast í sambandi við fiskiskap eftir svartkjafti.

Jørgen Niclasen sigur, at tað var fyri tveimum árum síðani, at lemmatrolararnir gjørdu vart við misnøgdina við russisku svartkjaftatrolarnar. Tá vórðu stakroyndir tiknar, men tær vístu ikki, at russararnir fiskaðu nevnivert av kongafiski.

– Síðani hava lemmatrolararnir ikki gjørt vart við seg, fyrrenn nú Bjarki Berg, skipari á Bresti, vísir á trupulleikan í samrøðu við Sosialin seinasta leygardag.

### Loysa málið

Jørgen Niclasen sigur, at av tí, at teir hava staðfest ein trupulleika, eru teir sjálvsagt sinnaðir at loysa hann.

Hvussu hesin trupulleikin verður loystur, er ov tíðliga at siga nakað um enn.

– Vit kunnu t.d. friða leiðir fyri svartkjaftafiskiskap, men vit kunnu eisini seta strangari reglar fyri, hvussu nógva hjáveiði, teir kunnu hava.

– Men tað, sum ofta hendir, er, at tá ið ein trupulleiki verður loystur, verður ein nýggjur skaptur, Tí skulu viðurskiftini kannast gjølliga, áðrenn tiltøk verða sett í verk. Eitt nú má kannast, hvar russararnir fáa kongafiskin, um tað eru ávísar tíðir av árinum, teir fáa kongafiskin, um tað eru aðrir, sum eisini hava trupulleikar o.s.fr., og tí ber ikki enn til at siga, hvørji tiltøk verða sett í verk.



*– Hava føroyskir trolarir trupulleikar av russiskum svartkjaftatrolarunum undir Føroyum, er tað eitt mál, sum skal loysast. Jørgen Niclasen sigur, at hann hevur longu tikið trupulleikan upp, sum skiparin á Bresti ger vart við í Sosialinum seinasta leygardag*

Teir, sum hava lemmatrolararnir, ivast eisini í, at tølini, sum russarnir geva upp, eru røtt, tí teir hava ferð eftir ferð sæð, at svartkjaftaposin hjá teimum er fullur av kongafiski. Teir siga eisini, at tað slepst ikki undan, at teir fáa nógvan kongafisk, tá ið teir fiska á kongafiskaleiðum, tí alt, sum fyri er, endar í posanum?

– Tað, fáið eg onki sagt um. Tað einasta, eg havi at halda meg til, eru tey veiðitøl, sum vit hava, og tey siga, at russisku skipini fiskaðu góð 2.500 tons av kongafiski í fjør. Men tað er eisini ein stór nøgd, tá ið føroysku skipini ikki fáa meiri enn góð 5.000 tons.

### Nógv viðurskifti

Annars heldur Jørgen Niclasen, at tað eru nógv viðurskifti sum gera seg galdandi og sum føra til, at fiskiskapurin eftir kongafiski undir Føroyum er so nógv minkaður seinastu árini.

Tí heldur hann ikki, at tað ber til at geva russarum einsamøllum, alla skyldina fyri afturgongdina.

– Fyri nøkrum árum síðani, í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum, fiskaðu vit eini 15.000 tons av kongafiski undir Føroyum. Orsøkin til, at fiskiskapurin síðani er minkaður brádliga, kann vera, at lemmatrolararnir partvís hava lagt seg eftir øðrum fiskasløgum.

– Men tað er eisini ógvuliga sannlíkt, at fiskiskapurin eftir kongafiski í Irmingarhavinum, hevur ávirka fiskiskapin eftir kongafiski undir Føroyum rættiliga nógv tann skeiva vegin. Fiskiskapurin efttir kongafiski undir Føroyum minkaði í takt við at fiskiskapurin í Irmingarhavinum tók rættiligt dik á seg. Fiskifrøðingar kanna málið og hóast teir ikki enn hava fingið endaligt prógv, siga teir, at tað er heilt nógv sum bendir á, at kongafiskurin í Irmingarhavinum er tann sami, sum er undir Føroyum, sigur Jørgen Niclasen.

Sí eisini greinina niðanfyri.

## Føroyingar fá ikki frið fyri russarum

Málið, sum Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri, sigur í greinini omanfyri, at hann er farin at arbeiða við, varð reist í Sosialinum seinasta leygardag. Tá fanst Bjarki Berg, skipari á Bresti, á, at føroysku lemmatrolararnir fingu ikki fiska fyri russisku svartkjaftaskipunum.

Russarnir troka føroysku trolararnar burtur av øllum leiðum, teir hava roynt á. Fyri nøkrum árum síðani, var vanligt, at føroysku trolararnir fiskaðu kongafisk eystan fyri, men so løgdust russisku svartkjaftatrolarnir á tað øki og tá ið teir høvdu verið tvær ferðir ígjøgnum, var ikki livandi at fáa aftur hjá føroysku trolarunum- og tað er enn steindeytt fyri kongafisk eystanfyri.

Nú er einasta leið, føroysku lemmatrolararnir hava eftir, vestanfyri Mykines, men nú eru russisku svartkjaftatrolararnir eisini komnir hagar. Bjarki Berg segði, at føroysku trolararnir javnan bróta hál av, hóast tey bara eru komin í helvt, tí at russkiskir trolarar liggja í vegin.

Hann stúrir fyri, at kongafiskurin eisini fer at verða oyddur vestanfyri og tí sigur hann, at einasti útvegur er at friða kongafiskaleiðirnar grynri enn 340 favnar fyri svartkjaftaskipunum.


